# Broyttar avgreiðslutíðir

2. januar 2002 vórðu avgreiðslutíðirnar á hesum posthúsum broyttar:

| | |
|---|---|
| Tórshavn, SMS | mánadag–fríggjadag kl. 10–16, tó hósdag til kl. 18 |
| Fuglafjørður | mánadag–fríggjadag kl. 09–15, tó hósdag til kl. 17 |
| Saltangará | mánadag–fríggjadag kl. 09–16, tó hósdag til kl. 17 |
| Klaksvík | mánadag–fríggjadag kl. 09–16, tó hósdag til kl. 17 |
| Tvøroyri | mánadag–fríggjadag kl. 09–16, tó hósdag til kl. 17 |
| Vágur | mánadag–fríggjadag kl. 09–16, tó hósdag til kl. 17 |

Postverk Føroya





optikbúðin

Bøgøta 4 • Box 92 • FO-110 Tórshavn • Tel 310088 • Fax 310058


**Skúlin á Fossánesi**

## Lærarastarv

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir lærara 19t/v.(frá 1.8 .2002 27 t/v)

Starvið er tíðaravmarkað: frá 2.2 til 31.12.2002.

Lærugreinir: Føroyskt 1., 2. flokki , Danskt 5., 6. flokki, Landalæra í 7. flokki , Hondarbeiði og Bókasavn.

Nærri upplýsingar fáast vit at venda sær til skúlan 45 21 20

Starvið verður lønt sambart avtalu millum Føroya Lærararfelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum skulu verða skúlastýrinum í hendi seinast fríggjadagin 18. januar 2002.

**Skúlastýrið fyri Skúlan á Fossánesi**
v/ John Kára Jacobsen
740 Hvannasund

## Tavan

Søkt verður eftir reinskerarum at byrja beinanvegin. Arbeitt verður í tveimum vaktum.

**Tavan**
520 Leirvík
Tlf. 213155 · Fax 443377

**Oljumálastýrið**

## Stuðul av játtanini til umhvørvisverndartiltøk

Oljumálastýrið umsitur eina játtan, hvørs endamál er at stuðla tiltøkum:

– sum menna vitanina um umhvørvið og/ella náttúruna
– sum virka dálkingarfyribyrgjandi og/ella - avmarkandi
– sum verja landsløg, djóra- og/ella plantusløg
– sum kunna almenningin um umhvørvis- og/ella nátturuviðurskifti

Játtanin verður umsitin sambært reglugerð, sum fæst á www.oms.fo , ella við at venda sær til umhvørvisdeildina í Oljumálastýrinum.

Umsóknarfreistin fyri stuðul er flutt frá 1. februar til 1. mars 2002.

Brekkutún 1 · Postsmoga 3059 · 110 Tórshavn
Tlf. 357070 · Fax 357075
e-mail: oms@oms.fo · www.oms.fo



Starv

## Lærlingur til verkstaðið

Á verkstaðnum, sum er undir Farmaleiðum, er eitt starv sum lærlingur leyst at seta.

**Starvið fevnir um**
Viðlíkahaldsarbeiði uppá lastbilar, bussar o.a. útbúnað.

**Førleikakrøv**
• Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
• Góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Áhugaði skulu senda umsókn til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 1. februar 2002, kl. 10:00.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú venda tær til Heina á Borg, farmaflutningsleiðara, á tlf. 343060, e-post: hab@ssl.fo
ella Boga í Gil, verkstaðsleiðara, á tlf. 343045, e-post: big@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.
Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.

# Ph.D. verkætlan á Náttúruvísindadeildini

Á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya er eitt 3 ára Ph.D.-lestrarstarv tøkt frá 1. mars 2002. Tað verður væntað, at tann, ið settur verður, kann verja arbeiði sítt fyri Ph.D.-gradina innan fyri tíðarrammuna uppá 3 ár.

Ph.D. verkætlanin verður skipað við atliti at føroysku jarðfrøðini og møguleikunum fyri at finna kolvetni í henni. Verkætlanin kann t.d. taka støði í einum av hesum evnisøkjunum (dømir):

• Model fyri hvussu alisfrøðiligir parametrar fordeila seg í basalti kring Føroyar, og hvønn týdning teir hava fyri jarðalisfrøðiligar metodur, ið verða brúktar til kortleggingar av løgum undir basaltinum.
• Geodynamisk model fyri »syn-rift« og »post-rift« útviklingi av Føroya-plattforminum og økjunum nærindis.
• Kanning av hvønn týdning »offset« hava fyri seismiska avmynding av leguggrýti undir føroyska basaltinum. Hetta kann gerast teoretiskt, við digitalum modellum og við praktiskum dømum (»case studies«).

Umsøkjarar til Ph.D.-lestrarstarvið skulu hava prógv sum cand. scient. ella sivilverkfrøðingur (t.d. prógv í jarðalisfrøði, jarðfrøði ella kolvetnisverkfrøði). Tó eru tey, ið eru ávegis at gera kandidatuppgávu, eisini vælkomin at søkja.

Tann, ið settur verður, kemur sum partur av Ph.D.-lestrarstarvinum at taka ymisk skeið og luttaka á ráðstevnum og verkstovum. Dentur verður lagdur á at hava gott samband við altjóða viðurkend granskingarumhvørvi, og tí má tann, ið settur verður, rokna við styttri ella longri tíðarskeiðum á læru- ella granskingarstovnum uttanlands.

Lønin er sambært stig 1 við førleikaløn stig 13 í sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya. Fyrivarni verður tikið fyri niðurstøðu frá Ph.D. arbeiðsbólki, sum skal verða tøk 1. februar. Setanartreytir annars eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya.

Umsóknarfreistin er mánadagin 21. januar 2002. Umsóknir við prógvum, ævisøgu (curriculum vitae), viðmælum og møguligum greinum skulu sendast í 4 eintøkum til

**Fróðskaparsetur Føroya,**
J. C. Svabos gøta 14,
Postrúm 272,
FO 110 Tórshavn.

Meira fæst at vita um verkætlanina við at venda sær til Morten Sparre Andersen, professara, á teldupostadressuni mortensa@setur.fo ella tlf. 315306.

Á Náttúruvísindadeildini (NVD) á Fróðskaparsetri Føroya eru íalt 8 vísindastarvsfólk innan stødd-, alis-, evna-, lív-, hav-, jarðalis- og ravmagnsverkfrøði. Harumframt eru tvey starvstovufólk á starvsstovuni og eitt skrivstovufólk í umsitingini. Í løtuni eru tríggjar Ph.D.-verkætlanir í gongd á NVD, og eru tær innan seismiskar signalviðgerðarhættir, mekaniskar eginleikar hjá basalti og simulering av oljureservoirum. NVD veitir Bachelor of Science (BS) útbúgvingar innan lívfrøði, ravmagnsverkfrøði, kolvetnisverkfrøði, teldufrøði og jarðalisfrøði. Undirvísingin verður veitt av starvsliðinum á NVD og av uml. 30 uttanseturs undirvísarunum, ið eru á øðrum stovnum og virkjum bæði í Føroyum og uttanlands. Í løtuni eru um 40 lesandi á NVD.

## Skrivstovuhølir til leigu

í miðbýnum – Niels Finsensgøtu 32 – í Havn.

Miðhæddin er um 100 fermetrar og kjallarin er um 50 fermetrar. Hølini skulu helst leigast út í einum leigumáli.

Hølini eru vælegnað sum skrivstovuhølir ella til annað vinnuligt endamál.

Áhugað kunnu ringja á tlf. 217366 í arbeiðstíð ella á tlf. 312957 eftir arbeiðstíð.


**HOTEL ØRAVÍK** ★★★
**Matstovan bjóðar**

Hvørt fríggja- og leygarkvøld:

-Rækjubland
-Enskan el. franskan búff

*Bert......155,-*

Hvønn sunnudag
millum kl. 12.00 og 15.00

-Suppu
-Steik
-Dessert

*Bert......128,-*

**Borðbílegging á**
**Tlf.: 37 13 02**
**Fax: 37 20 57**

**www.sosialurin.fo**

SPF BYGGIFRØÐI

**Dugnaligir timburmenn søkjast til sethúsabygging í miðstaðarøkinum.**

**Góð løn/akkord verður givin**

22 10 65
22 10 90


## 1. flokkur skúlaárið 2002/2003

Næmingar verða skrivaðir inn
**mánadagin 14. januar kl. 13.00.**

Havið dóps- ella navnaseðil við!

**Fuglafjarðar skúli**
Tlf. 444087

## Regluligu býráðsfundirnir

### hjá Runavíkar býráð 2002

verða hesar dagar kl. 17.30 í býráðshøllini:
31/01 – 28/02 – 04/04 – 30/04 – 30/05 – 27/06 – 29/08 – 26/09 – 31/10 – 28/11.

Mál, ið ynskjast viðgjørd á býráðsfundi, mega vera býráðnum í hendi 14 dagar áðrenn fundin.

**Runavíkar býráð**